


# Norðmenn norður á 73 stig eftir olju

**Jan Müller**

19.02.2014 - 18:40

Oljan.fo

Norska olju- og orkumálaráðið hevur boðað frá, at tað næsta umfarið at bjóða út loyvi at leita eftir og at útvinna olju í Barentshavinum verður í hesum ársfjórðinginum. Hetta er 23. útbjóðingarumfarið hjá norðmonnum.

Tað hevur vakt ans, at ætlanin er at bjóða út oljuloyvi longri norðuri og longri eysturi enn fyrr ella heilt norður á 73. breiddarstig. Tað er líka langt norðuri sum Bjarnoyggin og fiskimarkið kring Svalbard. Eystureftir verður farið tætt at russiska markinum.

Til sammetingar kann verða nevnt, at teir norðastu býirnir í Norðurnoregi, Honnongsvåg og Hammerfest, eru á 70 stigum norður, og at Drekaleiðin, sum íslendingar hava boðið út til oljuleiting, er millum 67 og 69 stig norður.